# Leið meg einaferð enn

**Við sorgblídni fóru seinastu pendlararnir um Vestmannasund týsmorgunin. Umborð á Ternuni var borreitt við morgunmati, sum Atlantsflog hevði latið**



*Borðið er dekkað við rundstykkjum og kaffi, sum pendlararnir fáa sær av seinasta túrin við Ternuni*

ENDIN
*Orð og myndir: Edvard Joensen*

**á Vestm,annasundi:** Sorgblídni og fráfaringardámur var umborð á Ternuni týsmorgunin. Fólk, sum í áravís dagliga hava ferðast um Sundið og hitst í salongini, søgdu farvæl.

Á Oyrargjógv er einki óvanligt at síggja, tá Ternan umleið hálvgum sjey leggur at, sum hon i áravís hevur gjørt. Kortini er kenslan eitt sindur øðrvísi, tí vit vita, at hetta er seinastu ferð, farið verður umborð á hetta skipið, sum líkasum er vorðið ein partur av gerandisdegnum.

Uppi í salongini er heldur øðrvísi, enn vanliga dagar hevur verið. Har eru borð dekkað við rundstykkjum, og kaffimaskinurnar standa á einum borðið mitt á dúrkinum. Karamellur og mandarinir standa í íløtum á ymsu borðunum, eins og ein stór samanplanting stendur á einum borði. Hon er frá einum av flutningsfeløgunum, sum regluliga hevur sent sínar stóru lastbilar um Vestmannasund. Ein heilsan og tøkk til manningina á Ternuni.

Fólk koma upp av dekkinum. Rættiliga nógv av vanligu ferðafólkunum mangla í dag. Tey hava tikið sær frí hendan stóra dagin. Vilja vera til staðar, tá tunnilin verður latin upp.

Tey, sum við eru, eru ikki so mælsk, sum onkuntíð hevur verið. Onkur undrast á borreiðingina, meðan onnur hava havt ein varhuga av hesum.

Fólk fáa sær rundstykki og kaffi og setast við vanligu borðini. Tosað verður sjálvandi um dagin og um tað, sum verið hevur, og fer at verða. Tað er heilt greitt, at her er ein onnur kensla í dag, enn hinar morgnarnar hevur verið.

Her er nakað, sum fólk fara at sakna, sum eisini onkur hevur á orði.

Lagt verður at, og fólk fara. Siga hátíðarliga farvæl. Sum tá menn fara til skips, og eingin veit at siga, nær komið verður aftur.

Ternan fær nýggj fólk umborð í Vestmanna og fer yvirum aftur. Sama søgan endurtekur seg, tá tey, sum fara við aðru rutu um Sundið møta.

Farið verður í land aftur, tá Ternan triðju ferð leggur at á Oyrargjógv klokkan gott átta. Fleiri bilar eru við, sum gera seinasta túrin við Ternuni. Teir heilsa allir, tá koyrt veru í land. Ein konsert, sum hoyrist víða hendan stilla morgunin.



*Seinasti jólabollin umborð*



*So er Magni komin seinastu ferð til Tingborðið at krevja inn*



*So er »ballið bui«. Fólk eru farin í land, og Eyðun turkar borðið eftir teimum seinastu*



# 105 metrar undir sjóvarmálanum



*Vágatunnilin er mjúkur og nossligur. Lítið merkist til hall, og á botninum er púra slætt*

**Eitt vágaverk er liðugt, og tað spældi væl av. Einaferð varð tað ørvitistos og stórlæti at tosa um ein undirsjóvartunnil. Tá tú nú stendur á slætta botninum langt undir Vestmannasundi kennist tað, sum tað natúrligasta í verðini**

VÁGAVERKIÐ
*Ingi Rasmussen*

Undir Vestmannasundi gongur ein tunnil, sum bindur Vágar saman við Streymoy.

Tað eru ein veruleiki, nú Vágatunnilin loksins er latin fyri almenninginum.

Snórurin varð klipptur seinnapartin týsdagin tann 10. desember 2002, og hesin dagurin fer altíð at standa sum ein merkisdagur í føroyskari samferðslusøgu. Hetta var dagurin, tá føroyingar bókstaviliga fóru nýggjar leiðir í royndunum at knýta allar føroyingar tættari saman.

Miðskeiðis undir sundinum er púra slætt og turt, og tú kanst ikki annað enn undrast á, at tú stendur 105 metrar undir sjóvarmálanum og hevur einar 40 metrar av bergi og 60 metrar av sjógvi uppi yvir tær. Her langt niðri í upphavi Føroya kennir tú teg onkursvegna tryggari enn ómaná, har trúgvu tænararnir umborð á Ternuni og SAM hava siglt sínar seinastu túrar við ferðafólkum og bilum.

## Eitt hall og annað

Hallið í tunlinum er onki at tosa um, hóast vit hava ferðast so langt niður í undirgrundina. Vegurin er mjúkur, tað er vítt til veggja og høgt til loftið. Kann ikki lata vera at hugsa, at tað var gott tað sama, at sunnara tunnilslinjan varð vald, heldur enn tann norðara, sum einaferð var upp á tal.

Stórt hall hjá landskassanum var annars orsøkin til, at tann fyrsti føroyski undirsjóvartunnilin varð steðgaður í í 1989. Men tíbetur hasaði kreppan skjótt av, so hol aftur kundi setast á arbeiðið. Byrjað varð streymoyarmegin hin 28. september 2000, og vágamegin varð fyrsta skotið latið 27. februar 2001.

Fólk hildu tað vera óðamannaverk at seta sær sum mál, at tunnilin skuldi verða liðugur longu við árslok 2003, men nú tá avtornar, hava tunnilsknassarnir sprongt og knossað so mikið væl, at vágaverkið er lokið langt áðrenn ætlað.

Og tað eru ikki smáar nøgdir av gróti koyrdar úr fimm kilometrar langa tunlinum. Omanfyri 300.000 kubikkmetrar er sprongdir, og tað er komið havnargerðini í Kollafirði til góðar. Tað krevur nógvan lóður, og heili 850 tons av spreingievni eru brúkt.

## Sorgblítt framstig

Gleðin er stór, men tað kennist eisini sorgblítt, nú túrurin um Vestmannasund ongantíð aftur verður tann sami.

Tá tú hevði verið uttanlands, fekst tú aftur samband við tínar røtur úti á dekkinum umborð á SAM ella Ternuni. Nústaðni tá tú andaði og merkti frísku og vátu føroysku luftina fáa lív og lit aftur í kjálkarnar, vart tú heimafturkomin.

Tað er søga. Síðsti kaffimunnurin úti á streymasjógvi um Sundið er drukkin, men afturfyri verður tað lættari og skjótari at koma heim. Nógv skjótari.

Við Vágatunlinum eru bara smáir 50 kilometrar uttan forðingar millum Havnina og Sørvág, so hendan lívæðrin millum høvuðsstaðin og flogvøllin tekur bara umleið trý korter at koyra. Áður tók túrurin líka leingi, sum flogferðin til Keypmannahavnar.

## Føroyar vaksa

Størstu gleðina eiga vágafólk í hesum tunnilsdøgum. Tey fáa teir dagligu fyrimunirnar, merkja økta frælsið, tryggleikan og framburðin, sum kann spyrjast burturúr. Styttri er til meginsjúkrahúsið, til útbúgvingarnar í Havn og til marknaðin hjá vinnuni.

Her eg standi á lægsta punkti, tykist tað, sum Føroyar eru vorðnar størri. Slættaratindur er vorðin hægri. Oyggjarnar víðari. Vegirnir longri.

Nú eru tríggjar tær størstu oyggjarnar knýttar saman, har tríggir fjórðingar av fólkinum býr. Kemur fast samband um Leirvíksfjørð, verða 85 prosent av føroyingum knýttir saman í eitt veganet.

Kanska er tað nakað tíðliga at droyma um tað, men her á botninum gongur bara ein veg. Uppeftir.

**Fakta**

**Vágatunnilin**

| | |
|---|---|
| Longd: | 4,9 metrar |
| Fríhædd: | 4,6 metrar |
| Breidd: | 10 metrar |
| Akbreyt: | 7 metrar |
| Dýpi: | 105 metrar |